## Soleiðis keypti leiðslan

Í blaðnum í gjár var onkur skeivleiki komin í, tá vit skrivaðu um, hvørjir insiderhandlar vóru gjørdir í Atlantic Airways, tá felagið varð skrásett. Vit biðja lesarunum halda okkum tilgóðar, og prenta her yvirlitið yvir fráboðaðu insider-handlarnar.

| Persónur | Starv | Partabrøv | Kr. |
|---|---|---|---|
| Magni Arge | stjóri | 11.497 | 3.000.717 |
| Marius Davidsen | stjóri | 3.490 | 910.890 |
| Petur J. Eiriksson | nevndarlimur | 2.003 | 522.783 |
| Christian Andreasen | nevndarlimur | 960 | 250.560 |
| Erling í Liða | nevndarlimur | 960 | 250.560 |
| Ingi Solberg Joensen | nevndarlimur | 200 | 52.200 |
| Verna Rasmussen | nevndarlimur | 200 | 52.200 |
| Tummas Rasmussen | | 195 | 50.895 |

## B&O til Aston Martin

Tað hevur leingi ljóða, at danska B&O hevur gjørt samstarvsavtalu við Mercedes um at framleiða ljóðanlegg til bilar teirra. Nú er tó almannakunngjørt, at talan er um samstarv við ensku Aston Martin. Og hóast talan tá er um ein sannan luksus-klassikara, so eru sølutølini ikki tey somu, sum tey eru hjá týsku stórkonsernini. Tað hevur eisini borið við sær, at partabrævakursurin hjá B&O er fallin í dag.

# Føroyar darlandi í 7.

*Bogi Eliasen,*
*cand.scient.pol*
*be@implementer.dk*





*Tað krevur politiskar raðfestingar at fáa úrtøku burturúr 7. rammuskrá*

5. desember komu fagnartíðindini, at Føroyar loksins høvdu megnað at samrátt seg til at gerast partur av 7. rammuskránni í granskingini hjá ES. Hóast talan er um eina ES skrá, so er tað nógv fleiri enn ES londini sum luttaka í hesum granskingarsamstarvi, sambært heimasíðuni hjá PF7 sjálvum luttaka fleiri enn 100 lond í samstarvinum.

Føroyar hava nú fingið eina politiska staðfesting av, at veruligar samráðingar verða tiknar upp. Føroyar skulu knýtast, sum atlimur at sjeyndu rammuskrá. Talan hevur verið um eitt áhaldandi mál frá føroyskari síðu síðani 2004, tað er at fegnast um, at vit nú eru komin so langt. Fyrisitingin og politiska skipanin eiga heiður uppibornan fyri at hava fingið málið so langt. Men allar súður eru ikki syftar enn. Føroyar og ES skulu fyrst samráðast seg fram til eina loysn og har er bert at vóna, at tað kann avgreiðast skjótt. Tað er eingin loyna, at fleiri føroyskir granskarar hava sitið og bíða eftir, at Føroyar kom upp í part og at mikið rumbul hevur staðist av, at partar av almennu fyrisitingini hava mett avtaluna verða uppá pláss fyri langari tíð síðani.

### Fyrsta trapputrin

Vit kunnu siga, at fyrsta trapputrin er rokkið við hesi avtaluni, men um vit ikki megna at gagnnýta møguleikarnar í henni er talan bert um útreiðslur. Vit skulu gjalda fyri at verða við í sjeyndu rammuskrá, eins hini luttakandi londini. Tey londini, sum klára seg væl fáa meira aftur enn tað tey gjalda í felagskassan hjá sjeyndu rammuskrá. Harafturat er møguleiki at verða við í størri felagsverkætlanum og tað er kanska har, at ein tann størsta gularótin hjá føroyskum granskarum er, nevniliga at kunna verða partur av størri verkætlanum.

### Krevur av politisku skipanini

Sjeyndi rammusáttmáli kemur ikki ístaðin fyri ein tilvitaðan føroyskan granskingarpolitik, heldur kunnu vit siga, at limaskapurin í sjeyndu rammuskránni dagsetur krøvini til føroyskan granskingar- og útbúgvingarpolitik. Vit hava nú meldað okkum inn í evropeiska granskingar- menningarsamstarvið, um vit ikki megna at fáa nógv betur viðurskifti innan granskingar og hægri útbúgving og sostatt fáa hesi øki raðfest politiskt, ja so kann tað gera tað sama.

### Vinnulívið skal við!

Sjeyndi rammusáttmálin er tó nógv meira enn almenn gransking. Ein stórur partur er samstarv millum fyritøkur, har sjeynda rammuskráin leggur serligan dent á nøkur øki. Sjeynda rammuskráin leggur soleiðis dent á fýra sløg av samstarvi, nevniliga ímillum smá og miðalstór virki, almennar stovnar, einstakar granskarar frá bæði tí privata og almenna geiranum og stovnar og granskarar, sum ikki eru partar av rammusáttmálanum. Soleiðis leggur henda avtalan ikki bert upp til, at leggja allar byrðar á tað almenna, men eisini at vinnan skal við. Tað hevur m.a. verið ført fram, at vit ikki hava nóg umfatandi vinnuliga gransking í Før-